LM-114/2020

**Hanna D. Andreassen**

**Fra:** YF-Stýrið <yf@yf.fo>
**Sendt:** Wednesday, January 27, 2021 21:55
**Til:** Tóri Højgaard
**Emne:** Re: Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið

Góðan dagin

Vísandi til skrivið um hoyring í sambandi við "Uppskot til løgtingslóg um at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið", hevur Yrkisfelagið Miðnám hesar viðmerkingar.

- Má vera greitt, at talan er um eina framskygda skipan til undirvísing, pedagogik og tøkni, sum er ætlað skúlum – at hon kemur at rigga á skúlunum frá byrjan.
- Skeið og upplæring fyri tey, ið skuldu brúka skipanina er alneyðug – játtan til hetta má fylgja við.
- Verandi KT vegleiðarar mugu ikki missa størv, mugu vera við í prosessini at byggja hetta upp, og framhaldandi vera við til at viðlíkahalda og menna didaktiska kt umhvørvið á skúlunum.
- Verandi lokal KT tænasta má varðveitast, soleiðis at tann tænasta og hjálp, sum starvsfólk á skúlunum ad hoc hava brúk fyri, verður verandi á lokalu skúlunum, tí hetta er tænasta, sum dagligur tørvur er á, og sum aloftast skal loysast beinanvegin.

Vinaliga

vegna Stýrið fyri YF

Olgar Danielsen, formaður

On Tue, 19 Jan 2021 at 21:48, Tóri Højgaard <ToriH@ummr.fo> wrote:

> Góðu tit
>
> Tykkum verður sent til hoyringar, "Uppskot til løgtingslóg um at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið"
>
> Talan er um uppskot til verklagslóg ið heimiðlar landsstýrismanninum at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið. Heildarætlanin er lýst í skjalinum "Saman um eina trygga KT-loysn – Heildarætlan fyri undirvísingarverkið 2021-2024", ið er viðheft sum fylgiskjal 1.
>
> Freistin at senda ráðnum viðmerkingar er ásett til **mikudagin 27. januar kl 16:00**
>
> Uppskotið er sent beinleiðis til:
>
> Stjórnarráðini